# Munnlig próvtøka

## Leiðbeining til lærarar

| | |
|---|---|
| **Fakligt øki** | Kjarnaøki, tema, tekstslag ella annað viðkomandi sambært undirvísingarfrágreiðingum. |
| **Ólisið tilfar** | Høvundur, heiti, árstal og annað viðkomandi. |
| **Próvtøku-spurningur** | Í próvtøkuspurninginum skal greitt koma fram, at próvtakarin skal viðgera ólisna tilfarið við viðkomandi háttalagi og sjálvstøðugt seta tað í frásjón og í samband við lisið tilfar úr undirvísingarfrágreiðingunum.<br><br>Leiðbeinandi spurningar, sum t.d. biðja próvtakaran leggja dent á nakað ávíst í viðgerðini ella í frásjónargerðini, kunnu vera. Somuleiðis ber til at vísa á ávíst lisið tilfar at seta í samband við. Havast má tá í huga, at leiðbeinandi spurningar ávirka torleikastigið á próvtøkuspurninginum og harvið eisini heildarmetingina av avrikinum hjá próvtakaranum. |

### Úr námsætlanini

Próvhoyringin varir umleið 30 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er umleið 60 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.

Undir próvhoyringini leggur próvtakarin fyri við framløgu við støði í próvtøkuspurninginum, sum próvtakarin hevur arbeitt við í fyrireikingartíðini. Restin av próvhoyringini er ein faklig samrøða millum próvtakara og próvhoyrara við støði í próvtøkuspurninginum og framløgu próvtakarans.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.